## Todi misti vitið

Fótbóltsspælarin Todi Jónsson misti vitið og varð lagdur inn á sjúkrahús í Kristiansand í Noregi, har hann spælir við felagnum Start. Hann fekk krampar og skalv illa ein fríggjamorgun, og hann fall í óvit eina løtu. Todi fór á sjúkrahús, har hann var til eftirlit til fram móti kvøldinum

– Orsøkin var helst nógva og strævna venjingin og broytingar í kostsamansetingini, sigur Todi um tilburðin, sum gjørdi at hann kundi ikki spæla sum ætlað við Start ímóti Molde sunnudagin.

## Tikin við 422 Ecstasy-tablettum

Ein 24 ára gamal maður fær eitt ára fongsulsrevsing fyri at hava roynt at smugla eina stóra nøgd av ecstasy-tablettir til landið. Maðurin var tikin, tá ið hann kom í land av Norrønu. Tollvaldið fann 422 og eina hálva ecstasy-tablett, og hetta størsta nøgdin av hesum tablettum, sum nakrantíð er funnin í Føroyum.

## John vann HM í egning

Fyri fyrstu verður skipað fyri Sjómannadegi í Klaksvík, og millum mongu tiltøkini er HM í egning. Egnarar koma úr Íslandi og Noregi at kappast við føroyingar, men føroyingarnir egna nógv skjótari. Og í finaluni um HM vinnur John Havn úr Klaksvík sannførandi.

– Føroyingar egna skjótari enn bæði íslendingar og norðmenn, so eg ivaðist ikki í, at ein føroyingur fór at vinna. Eg hevði bara ikki væntað, at tað fór at vera eg, sigur John Havn.

## Persson ræðist oljuna

Svenski forsætisráðharrin Gøran Persson vitjar í Føroyum, og í samrøðu við Sosialin sigur hann seg stúra fyri týdninginum, sum oljan hevur fingið í heimssamfelagnum.

– Samstundis sum vit gerast meira og meira bundin av olju, størri ávirkan hava høgu oljuprísirnir á okkara búskap. Vit mugu ongantíð ov skjótt bera so í bandi at fáa fleiri og størri íløgur gjørdar í verkætlanir, sum royna at menna nyøggjar orkukeldur, sum fara betri um umhvørvið, sigur hann.

*[ August ]*

# Fekk hornið aftur



*Seytjan ára gamli Kjartan Festirstein við horninum á staðnum, har hann datt á sjógv fyri 6 árum síðani.*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**Ein illveðursdag á heysti í 1999 fór argjamaðurin, Kjartan Festirstein, á sjógv í eini roynd at fáa fatur á einum horni, hann misti í eini hvirlu. Nú seks ár seinni sær hann hornið aftur fyri fyrstu ferð**

Hósdagurin 9/9-99. Hesin dagurin við øllum níggjutølunum fer seint í gloymskuna hjá í dag 17 ára gamla argjamanninum Kjartani Festirstein.

Í illveðri er hann á veg út á Argir eftir venjing á Musikkskúlanum. Brádliga tekur ein hvirla hornkassan hjá Kjartani, og kassin fer á flog. Kjartan roynir at fáa hendur á kassanum aftur, men ólukkutíð verður Kjartan tikin við brotunum á Argjalandi og rekur skjótt frá landi.

Lítla løtu seinni er hann eini 70 metrar frá landi. Í lívsvanda rópar Kjartan alt tað, hann er mentur, eftir hjálp, og stutt eftir leypa táverandi blaðmaðurin á Sosialinum, Høgni Mohr, og Hannus Petersen á bláman fyri at bjarga smádronginum.

Til alla eydnu eydnast tað Høgna og Hannusi at fáa Kjartan upp á turt í øllum góðum.

Upprunin til sjálvan tilburðin á Argjum á heysti í 1999, hornið hjá Kjartani Festirstein, sá kortini eingin nakrantíð nakað aftur til.

### – Hatta er mítt

Einseinnapartí í augustmánaði støkkur sløkkiliðsmaðurin og froskmaðurin, Heiðrikur Christiansen, inn á gólvi á Miðlahúsinum í Vágsbotni. Seinastu góðu tvey árini hevur hann havt eitt horn liggjandi í fýrrúminum heima við hús, sum hann, í samband við eina vanlukku, fann á botninum við Skansabryggjuna í Havn fyri sløkum tveimum árum síðan.

Stutt eftir, hann hevði funnið hornið, kom honum til hugs, at møguliga var tað hornið hjá Kjartani, sum var rikið ein kvartan fjórðing úr Argjalandið yvir á Skansabryggjuna við Molan í Havn.

Henda illveðursdagin á heysti 1999, tá Kjartan Festirstein fór á sjógv, var Heiðrikur annar av monnunum, sum var á staðnum fyri sløkkiliðið í Havn.

– Eg havi eina tíð hugsa um tað møguliga kundi vera hornið hjá Kjartani, sum eg havi havt liggjandi í fýrrúminum, og at tað kundi verið stuttligt hjá honum at sæð aftur. Eg havi sett hornið eitt sindur í stand, men tað hevur verið so leingi á botni, at tað neyvan fæst at spæla aftur, greiðir Heiðrikur Christiansen frá.

Vit vóru skjót at ringja til Kjartan Festirstein, og spyrja hann um hann hevði stundir til at koma framvið at hyggja eftir horninum. Hann játtaði, og góðar 20 minuttir seinni var hann á Miðlahúsinum.

– Jú hatta er tað hornið, eg misti handan dagin, er Kjartan skjótur at viðmerkja, tá hann ber eyga við hornið aftur. Hornið sær ikki út av nógvum í dag. Rustað og gjarvaksið. Kjartan Festirstein vildi kortini fegin hava hornið í varðveitslu, hóast tað neyvan fæst stórvegis tóni úr horninum aftur. Eitt gott minni um eina hendingaríkan tilburð.

» Vit noyðast tí at viðurkenna, at vit frameftir ikki kunnu byggja okkara kappingarføri á, um vit hava eitt lágt lønarlag, ella um vit hava eitt tilfeingi svimjandi kring oyggjarnar, men vit mugu alt meira byggja kappingarførið á okkara vitan og hegni til at skapa nýggjar vinnur, samstundis sum vit áhaldandi menna og betra um verandi vinnu. «

*– Jóannes Eidesgaard, løgmaður í ólavsøkurøðuni*

» Víst er sosiala kontrollið sterkari í lokalsamfelagnum, men mín niðurstøða er framvegis, at tú hevur betri fortreytir fyri at liva eitt erligari lív í Føroyum, tí føroyingar vilja vita, hvør tú ert, áðrenn teir vilja vita, hvat tú gert. Í teimum mentanum, eg havi livað í, er tað umvent. «

*– Renate Simonsen, ættað úr Sveis, men búsitandi í Føroyum*

**FSF boðar frá, at Henrik Larsen gevst sum venjari hjá føroyska fótbóltslandsliðnum, tá ið sáttmálin gongur út á heysti 2005.**